DAGSINS MEINING

Sjálvandi á ólavsøku!

Tað eru summi, sum seta spurbartekin við, um finalan í steypakappingini um Løgmanssteypin skal spælast á ólavsøku ella ikki.

Grundgevingarnar eru ymiskar. M.a. tann, at spælararnir eru kanska ikki so væl fyri síðst í juli, ti teir hava hildið frí frá landskappingini í nakrar vikur, og tí verður spælið í dystinum so sum so. Ein onnur grundgeving er hon, at finaludysturin skal ikki blandast saman við tjóðarhátíðina, tí torført at fáa spælrarnar at hugsa um fótboltin fyrst og fremst.

Nakað er sjálvandi um hesar grundgevingarnar og aðrar við. Hinvegin kann spurnartekin ikki setast við, at tað hevur skapt størri áhuga fyri finaluni um Løgmanssteypin, síðani hon varð sett til at verða spæld ólavsøkudag fyri nøkrum árum síðani.

Tey flestu munnu halda, at kappróðurin er høvuðspunktið á skránni fyri ólavsøkuaftan - í hvussu so er á ítróttarøkinum. Og tey flestu munnuhalda, at nú hava vit fingið eitt hæddarpunkt afturat á ítróttarliga økinum á ólavsøku, og tað er finaludysturin í steypakappingini.

Víst hevur altíð verið steypadystur ólavsøkudag millum annað havnarliðið og eitt av bygdaliðunum, men ein slíkur dystur kann á ongan hátt samanberast við tann hátíðardám, sum ein finaludystur um løgmanssteypin hevur.

Tað síggja vit eisini á áskoðaratalinum. Ífjør vóru meira enn 4200 fólk til finaludystin og í ár lá talið um 3300, sum má metast at vera eitt rættiliga høgt áskoðaratal. Harafturat eiga vit at minnast til, at á ólavsøku er helst meira enn helvtin av Føroya fólki í høvuðsstaðnum, so tað er tá, at fólk hava møguleika at leita sær niðan í Gundadal.

Finalan í ár vísti ikki tað stóra fótboltsspælið, men tað kunnu vera fleiri orsøkir til tað, sum ikki skulu umrøðast her, men ein er, at nógv stóð upp á spæl hjá báðum pørtum. Hja GÍ at spæla úti í Evropa eitt ár afturat, og hjá B36 í hvussu so er at tryggja sær sigur í steypakappigini.

At hava dystin fyrr í juli ella í fyrru helvt er sjálvandi ein møguleiki, men vit eiga at hugsa um, at tá eru nógv fólk í feriu, meðan støðan tykist vera tann, at nógv venda heim aftur fyri ólavsøku, ella bíða við at fara til eftir ólavsøku, og tí tykist sum at nógv fólk eru júst heima um hetta mundið.

Tá alt hetta er sagt, skal bara leggjast afturat, at tað klokkutíðin nær dysturin verður spældur, eigur at ásetast fyrr enn í sjálvari ólavsøku-vikuni. Harafturat er rættast at flyta dystin til seinri á degi, so finalan í steypakappingini hjá kvinnum ikki skal spælast, samstundis sum Løgtingið verður sett, og soleiðis at kappríðingin, sum er gamal táttur í skránni fyri ólavsøkudag, kann vera liðug, áðrenn finaludysturin byrjar. Men flytið ikki dystin til annan dag!

Sosialurin

VIÐMERKINGAR

Tað er spurningur um trúvirði

Sverre Midjord

Tað eru ikki tær ljósu tíðir, sum standa fyri stavn, men tað tykist ikki at órógva meirilutan á løgtingi.

Men broytingar hómast, hvat teir ymisku flokkarnir standa fyri politiskt. Tað var eitt álvarsligt stig, sum samgongan, sum var ímillum Tjóðveldisflokkin og Javnaðarflokkin tók við Finnboga Ísakson umsitandi figgjarmál, avgerðir, sum førdu til stovnsetan av fiskavirking. Henda avgerð kom at kosta Javnaðarflokkinum 5 løgtingslimir. Men seinni hevur henda avgerð víst seg at vera røtt. Hvussu hevði verið her á landi, um avgerðin ikki varð tikin?

Fiskavirking er í dag eitt gott arbeiðspláss. Fólkaflokkurin tók ikki undir við tí og tók seg úr samgonguni. Vit eru í einari líknandi støðu í dag. Vinnan hevur stuðul fyri neyðini, um alivinna og fyri tað rækjuvinnan ikki fáa hjálp, verður stórt arbeiðsloysi í landinum, eitt arbeiðsloysi, sum ALS-skipanin fær ilt við at greiða. Fólkaflokkurin, sum fór úr einari samgongu orsakað av fiskavirking, teir siga nú skilagott, at vinnan skal stuðlast. Tað eru Guds børn sum batna. Javnaðarflokkurin sigst vera ímóti stuðli, hvat er orsøkin, er tað eitt høgrarák, sum hevur yvirtikið flokkin? Vónandi ikki.

Kristina Háfoss, tinglimur, hevur veruliga sett sær fyri at forða fyri at vinnan skal stuðlast – hevur henda kvinnan veruliga hóming av avleiðingunum. Hon hevur lisið ella studerað, tað er lætt at lesa um hvussu tað skal vera, veruleikin er ein heilt annar, hvør tekur ábyrgdina, tá ið fleiri tímalønt verða arbeiðsleys og samfelagið missir marknað. Er hetta støða Tjóðveldisfloksins? Kristina Háfoss veit helst ikki, hvat tað er at hava skiftandi tímalønt arbeiði við lítlari inntøku. Hon hevur lisið. Tjóðveldisflokkurin er farin frá at vera ein fiskimanna- og arbeiðaraflokkur, til at vera ein høgrastýrdur akademiskur flokkur. Harmiligt. Sjálvandi skal Tjóðveldisflokkurin vera í samgongu. »Tann Tjóðveldisflokkur, sum eg var limur í«, so sigur Finnbogi Ísakson, so kann ein meta um hvat hann hugsar um. Í tjóðveldisblaðnum 14. September skrivaði Ólavur Michelsen, sáli, sum var blaðstjóri: Tey ungu skuldu ikki fingið loyvi at lisið framhaldandi, uttan at tey fyrst høvdu verið tøk í fiskivinnuni, ein form fyri verndarskyldu, soleiðis at tey skulu kenna grundarlagið undir samfelagi okkara.

Tað hevði verið gott, um Tjóðveldisflokkurin tók hetta til eftirtektar. Í dag er bert ein tingmaður í flokkinum við hesi grundseting.

Miðflokkurin er eisini farin til høgru. Teir siga eisini nei til at stuðla vinnulívinum. Teir hava fingið NATO í rangastrúpan.

Frá 1963 til 1985 avsetti Tvøroyrar Býráð 2% av skattainntøkuni beinleiðis á bundna konto í Sjóvinnubankanum til vinnulig endamál. Henda avseting gjørdi, at vit kundu stuðla við 250.000 kr. til eitt línuskip og 150.000 kr. til ein trolara, partapeningurin í Tvøroyrar Flakavirki varð goldin kontant, somuleiðis í Suðring og ikki at gloyma Rankan, sum kostaði 10 mill. meira enn upprunaliga ætlað.

Nevndin í Rankanum var Dánial av Rana, sum var formaður, Hermund Michelsen og Sverre Midjord. Vit høvdu peningin og tóku trolaran. Hvønn týdning hesi tiltøk hava havt er eingin ivi um. Teir borgarligu tóku av hesa skipan í 1985.

Formaður Miðfloksins kennir væl til hetta og hvønn týdning tað hevur havt fyri Tvøroyri og samfelagið alt. Stuðul til vinnulívið er ein hjálp til sjálvhjálp. Landskassin eru vit øll.

Í Sosialinum 134, 18/7, hevur ein búskaparfrøðingur sínar metingar og er hann ímóti stuðli og sigur hann tað soleiðis:

Tað er so nógv sagt, at kreppan kann hava ræðandi avleiðingar fyri føroyska samfelagið. Í fjør vórðu ialt útgoldnar 160 mill. kr. í lønum í alivinnuni, tað er 2,7% av samlaðu lønarútgjaldingini í Føroyum. Latið okkum siga at helvt fer á heysin, tað vil siga 1,3%, tað er ikki nakað ræðandi tal.

Tað er tað kanska ikki á telduni hjá Jóannes Jacobsen, men alivinnan er meira enn arbeiðsløn. Um prosentini hjá Jóannes Jacobsen verða roknað um til arbeiðspláss í Tórshavn, so vildu nógv fulltíðarstørv verið jarðløgd í Tórshavn.

Um so verður, tá fara telduknapparnir hjá onkrum at gløða.

Sosialurin

Lesið Sosialin - tað loysir seg

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Figgjarleiðari: Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad
finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo

Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

Myndamenn:
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

Sosialurin í Norðoyggjum:
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
Sosialurin í Suðuroy:
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
Sosialurin í Eysturoy:
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo
Sosialurin í Vágum:
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

Uppseting/prent:
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstoðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin
Avgreiðsla:
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-friggjadag klokkan 14^{00}

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Friggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framihjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.

Skips Sosialurin
- TÍÐINDI TIL SJÓFÓLK



Nú er tað gjørligt hjá okkara sjófólki at fylgja við hvat hendir

Fá ein heilan Sosial sum e-mail, hvørja ferð hann kemur út.

Henda útgáva er gjørd á ein slíkan hátt, at hon fyllir minst møguligt og tískil skjót at heinta niður. Hetta er gjørt við at grafikkurin er tikin burtur, so einans teksturin er eftir og síðani pakkaður niður. Blaðið er sjálvútpakkandi á telduni og verður lisið við browsara, umframt at møguleiki er fyri at skriva alt blaðið út.

Útgávan er serliga ætlað okkara sjófólki, ið hevur atgongd til e-mail umborð á skipinum.

Stuðlað Skips Sosialin hevur

KAUPTHING
Føroyar
Virðisbrævameklarafelag

Tíðindablaðið
Sosialurin Box 76 110 Tórshavn

ÓKEYPIS
Sosialurin rindar postgjaldið
64

Undirritaði teknar seg sum haldara av Skips - Sosialinum og fái fyrsta mánaðin ókeypis

Navn á skipi:
Kontakt pers.:
e-mail:
Undirskrift:

Hava tygum spurningar í hesum sambandi ring 213982 ella e-mail: *skipssosialurin@sosialurin.fo*

☐ *Tekst útgáva*
☐ *HTML útgava (uttan útskrift)*
☐ *HTML útgáva (við útskrift)*

Sosialurin